Poulina Slættanes

JÓLALØTUR

Leikur í 9 pørtum

(Pallurin er skilaður í tvey)

1986

Leikarar:

Mamman, Anna _____

Pápin, Mortan _____

Árant, sonur _____

Ása, dóttir _____

Omman _____

Sigrid Jacobsen _____

1936

Leikarar:

Birita í Ólavsstovu _____

Pætur í Ólavsstovu *hjún* _____

Malla, dóttir _____

Jógvan, sonur _____

Jóannes, sonur _____

Janus, sonur _____

Sunneva, vinkona Mallu _____

Sanna, kona í grannalagnum _____

Birna niðri í Stovu _____

Durita, dóttir hennara _____

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

Pápin: *(rótar í lummanum, hyggur at klokkuni)* Hvar í hundarnar eru billyklarnir? — Ger teg til, Árant, skalt tú við mær. *(Pápin fer út og Árant aftaná. Mamman hevur latið seg í frakka og húgvu, og Ása hevur okkurt, ið var í kalendaranum)*

Ása: Mamma, eitt endurskin. Lova mær at heingja tað upp á frakkan hjá tær. Tað er líka so umráðandi hjá vaksnum sum hjá børnum at nýta endurskin.

Mamman: Takk fyri, barnið. Far nú og lat teg í *(kyssir hana)*. Omma fer at vera her nú. *(Pápin kemur enn einaferð inn at leita eftir billyklunum. Ása fer ljódliga út)*

Árant: Babba, lykilin stendur í bilinum. *(vendir sær á)* Nú er Mallomma her. *(Pápin og Árant fara avstað)*

Omman: Nú var eg nakað sein. Far bara Anna, er Ása ikki uppi?

Mamman: Jú, hon er inni í kamarinum og letur seg í. So vóni eg, at tað gongst væl. Adjø, mamma.

Omman: Adjø. *(Omman tekur okkurt upp úr taskuni. Hon syngur ella murrar okkurt jólalag (Eg gleðist so hvørt jólakvøld). Fer út við frakkanum, kemur inn aftur og ruddar av borðinum. Ása kemur inn)*

Ása: Hey omma, gott at sleppa frá at vera einsamøll. Hvat skulu vit finna uppá at gera, omma?

Omman: Eg veit ikki Ása. Tað kundi verið so mangt. Ætlar tú kanska at síggja video?

Ása: *(slær á nakka)* Nei, tað skal eg ikki. Nú er tað bara Árant, sum situr og gløðir. Øll hini eru móð av tí.

Omman: Eg hugsi so við. Okkurt annað er at takast við ein myrkan vetrarmorgun. Sig mær, Ása. Hava tit keypt tykkum jólatræ?

Ása: Ja, babba keypti tað í gjár. Vit taka tað inn í annaðkvøld. Hevur omma fingið nakað.

Omman: Um eg havi? Jú, eg skal siga tær eitt. Mallomma var á bingo í gjárkvøldið...

Ása: Tú vanst ikki eitt jólatræ?

Mamman: Jú, hatta dugdi tú væl og virðiliga. Gamli Grundtvig dugdi so sanniliga eisini. *(Inn kemur ein javnaldur hjá Mallu, Sunneva. Hon setur seg tigandi niður, tekur upp úr fyriklæðlummanum eitt band, sum hon situr og spælir við)*

Mamman: Nú var Sunneva her. Hvussu livir abbi tykkara í morgun?

Sunneva: Mamma sigur, at hann er nógv batnaður. Helst fer hann at kunna lesa lesturin jóladag.

Mamman: So man tað fara at javna seg.

Malla: Dugir tú jólaørindið Sunneva?

Sunneva: Jú, bæði frammanífrá og aftanífrá. *(Jógvan, Jóannes og Janus apa sær og syngja fyrstu reglu. »Dejlig er den himmel blaa«.*

Mamman: *(hóttandi)* Tit vita, tit ikki skulu syngja við mati í munninum. *(Hon er nú liðug at flætta Mallu)*

Malla: Nú kann eg fara í skúla *(Sunneva reisist og Malla fer yvir og kyssir mammuna á pannuna, sum signar dóttrina: I faderens, sønnens og Hellige åndens navn).*

Mamman: Jesus fylgi tykkum, gentur, verið nú so góðar í skúlanum. Farvæl. *(tær fara; hon vendir sær móti dreingjunum)* Tit skulu ikki í skúlan fyrr enn eftir morgunmatartíman. Í morgin er jólaaftan, vita tit, so okkurt er hjá tykkum óvitum at fáast við til høgtíðina. Pápi tykkara fer eftir torvi, tá ið hann hevur verið hjá kúnni, men tykkum fari eg at senda oman í handilin at keypa. *(Dreingirnir reisast, taka í troyggjurondina hjá hvør øðrum og ganga í rossafylgi)*

Mamman: Jógvan, fjeringapund av kaffi, Jóannes, tvey lodd av rosinum, Janus, upp í skálina av grønsápu. Hvat segði eg so? *(peikar á hvønn teirra)*

Jógvan: Fjeringapund av kaffi.

Jóannes: Tvey lodd av rosinum.

Janus: Upp í skálina av kaffi.

Mamman: Nei, Janus, eg segði....

Jógvan: Vit fara oman á skúlalagið at stikla hornaklingur.

Mamman: Farið so beint í skúla, tá ið lærarin rópar tykkum. *(Teir fara)*

Sanna: Eg skal í handilin at keypa mær pipar til jólaknettini, so eg ynski tykkum gleðilig jól í Ólavsstovu, áðrenn eg fari. 2. jólakvøld síggjast vit til jólatræ í skúlanum.

Mamman: Jú, tað gera vit. Gleðilig jól og heilsa mær gomlu móður tíni. Farvæl *(Sanna fer, og ljósið sloknar).*

3. partur

1986 *Sama rúmið sum í 1. parti. Á pallinum sita omman og Ása. Júst sum vit sóu tær, tá ið 1. partur endaði.*

Ása: Omma, Jógvan, Jóannes og Janus — eru tað Jógvan ommubeiggi og teir?

Omman: Ja, og Jóannes, tað er ommubeiggi tín, sum flutti til Amerika í 1947, og sum ongantíð hevur verið heima aftur.

Ása: Og Sunneva, var tað hon, ið var inni hjá tær á ólavsøku?

Omman: Ja. *(Tað verður bankað uppá, og inn kemur ein ung kona)*

Sigrid: Góðan dag. Eg ætlaði at hyggja til Ásu. Eg eiti Sigrid Jacobsen. *(Omman tekur í hondina á tí fremmandu og ger tekn til Ásu)*

Omman: Gerið so væl og setið tygum.

Sigrid: *(setur seg)* Jamen, her situr jú Ása, og væl stendur til, ætli eg. Tað vóru hon og eg, ið bóru saman í ferðsluóhappinum. Hon fekk skaða í høvdið, og tí vildi eg vita, hvussu til stendur.

Omman: Ja, tit vóru tvær av teim mongu, ið dagliga verða løstaðar í ferðsluni. Hvussu barst tað á?

Sigrid: Tað er ilt at siga. Sýnið var ringt, og ferðslan nógv. Ása hevði onga lykt á súkkluni, so eg sá hana ikki. Helst vóru vit samsekar.

Omman: Fingu tygum nakran snudd?

Sigrid: Nei, tað var ikki stórvegis — bilurin fekk eina buklu, tað var alt. Hvussu livst, Ása, tú ert ikki farin aftur í skúla?

Pætur: Eg lovaði teimum niðri í Stovu ein bita av jólaseyðinum. Hvat sigur tú, konan?

Konan: Jú, Pætur, teimum geva vit av hjarta ein feskan bita burturav. Ikki er stuttligt hjá Binu at hava mannin liggjandi á songini tuberklasjúkan. Bina stríðist frá tíðliga á morgni til seint á kvøldi — nógv eiga tey børnini.

Pætur: Ja, trongligar eru umstøðurnar hjá teimum niðri í Stovu. Beiggja sín misti hon undir Íslandi í vár, og mamman fer av teringi í bestu hoyggingartíð. Sanniliga hevur hon í árinum, sum fer, verið hart rakt.

Konan: Ja, gævi árið, ið kemur, sær ljósari út hjá teimum. Úti í heiminum ljóðar heldur ikki frá góðum tíðum.

Pætur: Bara vit fáa frið, sum búgva í Føroyum. Eg ræðist hesi skipini, sigla undir vatninum. Flogførini hoyra og síggja vit, men hesum ránsmonnunum undir vatnskorpuni hava vit ongan grunsil av. *(Tað bankar varisliga, inn kemur Bina niðri í Stovu, hon hevur eitt fat í hondini)*

Bina: Sum her er fjálgt og hugnaligt inni. Tað sær næstan út, sum at eg gangi biddaragongd, *(vísir teimum fatið)* men Pætur bað meg ganga inn og fáa ein bita av geldseyðinum.

Konan: Einki gongur tú biddaragongd. Hvussu er vorðið niðri hjá tykkum, Bina?

Bina: Ikki er tað ov væl vorðið. Men eg havi fingið eitt sindur av fiskasoði niður í Mikkjal í dag. Og tað styrkir hann so væl. Hann verður helst skjótt aftur á sanatoriinum, tíverri.

5. partur

1986 *sum 3. partur.*

Ása: Omma, hvussu varð so við tí sjúka manninum? Gjørdist hann frískur?

Omman: Nei, góða. Hann fór suður aftur á sanatoriið, og páskadag varð hann borin í kirkjugarðin. Tá var einki, ið æt einkjupeningur ella barnastudningur, men kortini fekk Bina børnini undan, og hon skyldaði ongum nakað.

Mamman: Hetta er góður fiskur. Molið nú einki niður á gólvið.

Pápin: Og sperðilin er ikki at forakta.

Mamman: Tá ið liðugt er at eta, fara vit inn í góðustovu at hoyra pápa lesa jólaevangeliið, og so syngja vit jólaørindið. Eg havi kynt við torvi, so í kvøld verður eingin kaldur har inni. Pakkarnir, tit eiga, skulu tit lata liggja til jólamorgun.

Pápin: Ja, mamma ber fruktgreyt inn í stovuna til tykkara *(við mammuna)* og til okkum bæði gomlu er ein kaffimunnur góður. *(Pápin og dreingirnir fara friðarliga út)*

Malla: Skulu vit fara inn nú, mamma?

Mamman: Ja, latum okkum fara.

Malla: Kann eg sleppa at tendra ljósini í vindeyganum?

Mamman: Sjálvandi. *(gevur henni svávuldós) (tær fara út)*

7. partur

1986

Omman: Hetta var so tað, unga dama.

Ása: Ja, men hatta var heilt áhugavert. *(Lurtar)* Eg hoyri mammu nú. Endiliga kom hon aftur. *(Mamman kemur inn »fullfermd«).*

Mamman: *(Puffar óført)* Oyje, eg eri móð. Í býnum var so nógv ferðsla, og uttan fyri SMS var alt eitt kaos.

Ása: Mamma, fara vit í kvøld at pakka jólagávurnar inn?

Mamman: Tað fara vit, bara eg ikki sovni, áðrenn kvøldið kemur. Eg hevði ætlað mær at bakað okkurt. Gott at fáa dunnurnar steiktar uppi á Hotel Borg. So sleppa vit frá tí.

Omman: Og rísdessertina. Hana geri eg *(filmar).*

Ása: Sigrid Jacobsen var her í dag. Hon gav mær henda pakkan.

barnið varð føtt. Hesi ljós skulu skína í hvønn krók. Og tá ið ljósini eru niðurbrunnin, og alt tekur at dimmast, tá eiga vit ikki at gloyma, at jólastjørnan altíð lýsir. Tá smáar og stórar hendur taka saman um jólatræið, syngja vit av hjarta:

O gævi eg kundi sungið so,
tá gleddist Jesu lund,
tí eg við var Guðs kæra barn
á halgu skírnarstund.

Glerpípur bráðna, kavin tiðnar, og árstíðir skifta. Okkara lítla tilvera stevnir á gátuførar leiðir — men heimsins frelsari livir. Hetta er okkara boðskapur í leikinum, vit kallaðu Jólaløtur.
(Allir leikararnir koma inn, og pallurin 1936 og pallurin 1986 eru alljósir. Tey syngja:

Jólatræið pyntað er,
grøna greinin kurvar ber.
Børn í stási sláa ring,
dansa so um gólv íkring.
(taka saman við Jólatræið)
Jólaklokkur ringja brátt
út um heimin jólanátt.

Hví vit halda jól, er tí,
Jesus kom inn heimin í,
veitti okkum ljós og trygd,
álit hava vit øll bygt
á hitt halga Jesu navn,
sum vit hava fyri stavn.